# DÁMAR TÆR UNDIRHALD?

Expert í SMS er Føroya besti undirhaldshandil við øllum tí nýggjasta innan tøkni og undirhald.

Vit sóknast eftir einum sølufólki, ið skilir týdningin av at geva kundum okkara bestu tænastuna, eitt gott upplivilsi og at vera partur av drívmegini, ið merkir virkna liðið í Expert.

Vit vænta, at:
- Tú ert fyrikomandi og setur kundatænastu hægst.
- Tú ert ágrýtin.
- Tú ert til reiðar at taka eyka tøk, tá hetta krevst.
- Tú ert opin og áhugað/ur í øllum tí nýggja, ið rørist innan tøkni og undirhald.

Vit kunnu bjóða tær:
- Eitt spennandi starv í einari vinnu við høgari ferð, ið altíð er merkt av menning og nýggjari tøkni.
- At vera partur av einum ungum og virknum starvsliði, ið altíð skal menna okkara virkisøki.
- Góðar karmar at trívast og mennast innan handilsvinnuna.

Ert tú til reiðar at átaka tær hesa avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær. Set nøkur orð saman um teg sjálva/n og send tey innan 30. august til:

Expert
Postsmoga 1057
FO-110 Tórshavn

Tú kanst eisini ringja til Høgna á tlf. 216525 ella senda honum ein mail á hogni@expert.fo fyri at frætta meira um hetta spennandi starv.

Expert er heimsins størsta radio/TV-keta við fleiri enn 7.000 handlum kring heimin. Í Danmark er Expert væl umboðað við 75 handlum kring landið. Eigarar av Expert í Danmark eru Expert ASA í Noregi.
Í Norðurlondum verður keypt inn til fleiri enn 1.000 handlar. Í Expert seta vit kundan hægst og bjóða bestu tænastu og vegleiðing.

SENDISTOVAN



**EXPERT TÓRSHAVN**
SMS Tel. 35 35 35 www.expert.fo

expert

# MATSTOVA TIL LEIGU

Restaurant Fjørukrógvin í Vestmanna verður hervið lýst til leigu. Talan er um part av spennandi konsepti við føstum kundaskara. Fyri rætta persónin er talan um spennandi og lønandi avbjóðing við góðum framtíðarútlitum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Vestmanna Tourist Centre, tel. 471 500 ella við at senda ein teldupost: touristinfo@post.olivant.fo.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. sept. 2008.

VESTMANNA
Tourist Centre

Partafelagið Vestmanna Tourist Centre varð stovnað í 2004 við tí endamáli at veita fleiri tænastur til mongu ferðafólkini sum koma til Vestmanna.

Umframt at selja útferðir undir Vestmannabjørgini er eisini gávubúð og matstovan Fjørukrógvin í húsinum. Ætlandi letur eisini upp forkunnugt Søgusavn í Vestmanna Tourist Centre í 2009.

SENDISTOVAN

Vestmanna Tourist Centre · +298 47 15 00 / +298 28 15 00 · Fax +298 47 15 09 · touristinfo@post.olivant.fo

almannastovan
www.almannastovan.fo

## SÁLARFRØÐINGAR

### TIL ALMANNASTOVUNA / FAMILJUHÚSIÐ

Søkt verður eftir 2 sálarfrøðingum til Almannastovuna/Familjuhúsið at byrja 1. september 2008 ella skjótast til ber. Størvini eru fulltíðarstørv, men møguleiki er eisini fyri at arbeiða niðursetta tíð. Arbeiðsøkið umfatar alt stovnsøkið, men í løtuni er arbeiðsøkið Familjuhúsið.

UM FAMILJUHÚSIÐ
Familjuhúsið er ein fyriskipan undir Almannastovuni, og heldur til í húsum í Sandagerði.

Í húsinum eru fleiri eindir:
- familjuráðgeving
- dagviðgerðareind
- eygleiðingar- og útgreiningareind
- bráðfeingisbúpláss

UM STARVIÐ
Familjuráðgevingin veitir ráðgeving, vegleiðing og viðgerð til børn og ung við umfatandi førleikatarni og familjur teirra.

Dagviðgerðareindin veitir í samstarvi við Mentamálaráðið undirvísing og námsfrøðiliga viðgerð til børn og ung við víðfevndum sálarligum trupulleikum, ið ikki rúmast í fólkaskúlanum.

Fyri at betra um visitatiónina inn á stovnsøkið, og fyri at menna stovnsøkið til at kunna nøkta fjølbroytta tørvin á stovnstilboðum, eru ætlanir at stovna eina eygleiðingar- og útgreiningareind.

Fyri at tryggja børnunum búpláss, meðan útgreiningin fer fram, er ætlanin at útvega bráðfeingis búpláss.

FØRLEIKAKRØV
Vit sóknast eftir 2 fólkum við útbúgvingunum cand. psyk. ella cand. pæd. psyk.

SETANARVIÐURSKIFTI
Løn og setanarviðurskifti verða smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra.

UMSÓKNARFREIST
Skrivlig umsókn saman við prógvi o.ø. skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 25.08.08, kl. 12.

UMSÓKN SENDAST TIL
Almannastovan, Smyrilsvegur 20
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Viðmerkjast: Sálarfrøðingur til Almannastovuna.

KREA

STARVSFÓLKALÝSING



## Vit sóknast eftir
# timburmanni/snikkara
## at byrja skjótast gjørligt

Ert tú dugnaligur timburmaður/snikkari ella hevur royndir innan fakið, set teg so í samband við okkum. Ring á tel. 565600 ella send teldupost til viking@viking.fo. Løn samsvarandi avtalu.

KERN.fo

VIKING SMÍÐ
www.viking.fo

*Viking Smíð átekur sær alt timbur- og snikkaraarbeiði, stoyping og elementframleiðslu.*